# Ársins spælarar skulu kjósast

**Leygarkvøldið verður fótbóltsgalla í Havn, har ársins spælarar hjá kvinnum og monnum skulu finnast. Útvarpið fer at hava beinleiðis frásøgn frá tiltakinum**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*

Nú skulu ársins spælarar og venjarar í fótbóltskappingini finnast. Platform hýsir leygarkvøldið fótbóltsgalla, har tað verður avdúkað, hvørjir spælarar skulu heiðrast í ár.

Seinastu árini hevur fótbóltsgalla verið skipað sum stórt borðhald, men í ár verður øðrvísi.

Hesaferð er talan um eina móttøku við onkrum løttum til matna. Hetta halda fyrireikararnir hóskar seg betri hesa tíðina, tá nógvur veitslur annars eru á skránni.

### Nýggja atkvøðugreiðsla

Í ár verða tað ikki fótbóltsáhugað, sum koma at gera av, hvørjir ársins spælarar verða.

Hinvegin verða tað umboð fyri fjølmiðlarnar, liðskiparar hjá fótbóltsliðunum og venjarar, sum saman skulu finna ársins spælarar.

Í ár verða árins spælarar, ársins málverji, ársins stjørnuskot og ársins venjari funnin. Hetta eru nakað færri kjósingar enn vanligt hevur verið seinnu árini, men ivaleyst nógv greiðari.

### Beinleiðis í ÚF

Útvarpið fer at senda frá tiltakinum leygarkvøldið. Leygarkvøldssendingin Leið 5 fer at hava umboð á staðnum, og tí kunnu fólk umvegis lurtitólið fylgja við í, hvør verður heiðraður.

Fótbóltsgalla verður á dansistaðnum Platform í Havn leygarkvøldið kl. 21.30. Tiltakið varðar í mesta lagi tveir tímar, tí kl. 23.30 byrjar vanliga dansivirksemið hjá Platform.

Saman við Platform skipar Sosialurin fyri tiltakinum, og fyrireikararnir hava sent atgongumerki út til feløgini. Er tað okkurt felag, sum ikki hevur fingið atgongumerki til kvøldið, kunnu tey venda sær til Platform.



*Leygarkvøldið verður tað avdúkað, hvørjir ársins spælarar og venjarar eru hjá kvinnum og monnum. Útvarpið fer at senda beinleiðis frá tiltakinum*



# Ongin dagrøkt í Kollafirði



**Klokkan 7.00 í gjáramorgunin fóru teir 15 dagrøktararnir í Kollafirði í arbeiðssteðg. Grundin til arbeiðssteðgin er, at Tórshavnar Kommuna ikki virðir rættin hjá dagrøktarunum og øðrum arbeiðsfólki at skipa seg í fakfelag, vil Føroya Arbeiðarafelag vera við**

ARBEIÐSSTEÐGUR
*Ingrid Bjarnastein*

Kollafjarðar Kommuna og Føroya Arbeiðarafelag gjørdu í ár 2000 sáttmála fyri dagrøktararnar í Kollafirði. Leiðarin á lønardeildini hjá Tórshavnar Kommunu var við til samráðingarnar og góðtók treytirnar, ið vórðu settar í sáttmálanum.

Dagrøktararnir í Kollafirði hava altíð verið limir í Kollafjarðar Arbeiðarafelag, men tá kommunurnar løgdu saman 01.01.01 vísti tað seg skjótt, at Tórshavnar Kommuna ikki virdi sáttmálan, ið dagrøktararnir høvdu fingið.

Tórshavnar Kommuna er eisini farin at taka prosentgjøld av lønunum hjá dagrøktarunum til eina lívstryggingar- og eftirlønarskipan hjá einum heilt øðrum fakfelag har dagrøktararnir ongantíð hava verið limir.

Dagrøktararnir hava í apríl mánaða í ár boðað frá, at teir framvegis ynskja at vera limir í Kollafjarðar Arbeiðarafelag, sum er limur í Føroya Arbeiðarafelag, og heittu teir eisini býráðið á, um at flyta prosentgjøldini, sum eru ásett í sáttmálanum, til Kollafjarðar og Føroya Arbeiðarafelag. Hendan áheitan hevur ongantíð verið eftirlíkað.

### Tolið uppi

Føroya Arbeiðarafelag finnur seg ikki í, at býráðsumsitingin fer so illa við starvsfólkunum í kommuni, og nú er tolið uppi.

Sum ein avleiðing av hesum boðaði Føroya Arbeiðarafelag í farnu viku býráðnum frá, at teir vildu hava samráðingar fyri dagrøktararnar innan týsdagin 16.10.2001. Ein vika er nú farin síðani freistin var úti, og onki er hent enn. Tí fóru dagrøktararnir í Kollafirði í arbeiðssteðg í gjár.

Føroya Arbeiðarafelag hevur heitt á Starvsmannafelagið um at nokta limum sínum at taka upp arbeiði, sum er rakt av arbeiðssteðgi.

# KT-Trygd á Hotel Føroyum

**Mánadagin 22. oktober var kunningarfundur á Hotel Føroyum, sum TK Stovan skipaði fyri. Hesin fundur varð kallaður KT-TRYGD, og var um, hvussu virkir kunnu tryggja seg ímóti telduvirus og teldusníkum**

KUNNINGARFUNDUR
*Ingrid Bjarnastein*

TK Stovan skipaði mánadagin fyri kunningarfundi á Hotel Føroyum. Ein kunningarfundur er eitt millumting millum skeið og fyrilestrar. Hesin fundur var mest ætlaður virkjum og stovnum fyri at upplýsa tey um, hvussu tey á bestan hátt kunnu varða seg móti telduvirus og teldusníkum.

Seks fyrilestrahaldarar tosaðu um trygd. Jónsvein Joensen, ið er útbúgvin cand. merc. dat. og dagliga starvast hjá Faroesoft, Jóhan Martin Jacobsen, KT-grannskoðari í grannskoðaravirkinum Rasmussen & Weihe, Jógvan Elias Winther Poulsen, advokat fulltrúi og Kjartan Dalsgaard frá Tryggingarfelagnum Føroyar.

Síðani vóru eisini tvey umboð fyri tvey virki, Niels Kristian Nolsøe frá Elektron og Olaf Enemoto frá Farodane.

Nomið varð millum annað við ymisk vandamál, lógfrøðilig sjónvarmið í sambandi við KT-trygd, vágar, sum eru í mun til valda KT-trygd og so framvegis.

Skeiðið vardi bert henda eina seinnpartin, men undirtøkan sera góð. Umleið 110 luttakarar vóru við.



# Hevjið í Homrum



Ríð tær ikki so niðarlaga
við Júkagørðum fram,
úti stendur Grimhild
við so mangan mann.

BÓKAUMMÆLI FYRIBILS
*Hans Jacob Debes*



Emil Thomsen hevur gjørt enn eitt bragd. Hann hevur givið ella gevur út “Føroya kvæði”, tey fyrstu 2o av 40. Alt er ikki komið enn; men tað kemur. Í skreytútgávu. Hetta er Føroya tjóðskaparverk, sum Emil hevur fingið lív afturí. Og tað er samstundis við til at fáa lív aftur í tjóðskapin. Eingin hevur kveikt lív aftur í hann, sum júst Emil, saman við øllum øðrum, hann er komin við. Tað man vera øllum kunnugt. Tað er ikki løtuverk at fara undir eina nýggja útgávu av Føroya kvæðum. Hvat var føroysk mentan uttan tey? Og málið? At duga at taka til eitt kvæðaørindi í rættum tíma, eisini tað var og er føroysk mentan - um tað so var triðja morgun. Og so at fara undir hetta vakra stórverk á 86. aldri - ja, tað er beinleiðis ótrúligt, og byggir á eitt áræði, sum fáur á foldini hevur havt.

### Úr Fororðinum

“Nú FØROYA KVÆÐI koma út sum fólkaútgáva, er eitt ynski, sum BÓKAGARÐUR leingi hevur havt í hyggju at fremja, vorðið veruleiki. Tiltakið var fyri nøkrum árum síðan komið væl áleiðis, men tá ið fíggjarkreppan lamdi samfelagið, kom steðgur í. Ætlanin var kortini ikki slept, og nú vónin aftur birtist um frægari tíðir fyri land og fólk hevur BÓKAGARÐUR gjørt av at fremja ætlanina.”

### Stórætlan

Hetta er stórætlan. Helst tann størsta í Føroyum nakrantíð. Hetta er ikki at ríða niðarlaga.

Tað ber ikki til at taka bók fyri bók, tá ið meira enn tjúgu eru komnar. Tað ber heldur ikki til at taka kvæði fyri kvæði og er helst heldur ikki neyðugt.

Tó, tað er hugtakandi at síggja og lesa allar variantarnar av sama kvæði. Hetta vísir individualitetin í føroyskum kvæðaskaldskapi. Júst tí at hann var borin á manna munni, oyggj úr oyggj, bygd úr bygd.

### Innsavnarar

Allar kvæðaútgávur mugu byggja á innsavningar hjá Svabo, Jóhannes Í Króki og allar hinar, systematiseringina hjá Svend Grundtvig og niðurskrivingina hjá svági hansara Jørgen Bloch, “Corpus Carminum Færoensium”.

Tað mátti av sonnum vera ein fundur, at Emil fekk fatur á læraranum og sálarfrøðinginum Dánjali Niclasen, ættaður úr Kunoy, ivaleyst kann kønasti í hesum kunnleika.

Dánjal í Kunoy hevur skrivað ein lærdan inngang til hvørt kvæði. Hetta er stórarbeiði, sum má hava tikið nógv tíð. Alt er so væl granskað og so væl skrivað. Spell, at Dánjal ikki slapp at síggja hesa snotuligu útgávu.

Í dag granskar eingin kvæði og kvæðasøgu líka so lítið sum nakað annað. Ið hvussu er sæst einki úrslit av nakrari gransking. Einki um aldur kvæðanna og um málið í teimum, eisini eftir aldri.

### Lívsvísdómur

Kvæðini eru full av lívsvísdómi, sum ikki er føroyingum fremmandur.

Tað ber ikki til at taka nakran serligan vísdóm burtur úr hesum velduga verki, sum ikki verður lisið eftir fáum døgum. Serliga variantarnir eru ikki altíð lættir at halda hvør frá øðrum.

Útgávan er ikki liðug enn. Fleiri bind eru eftir.

Um Emil ikki hevði havt annað gjørt, sum hevði hetta stórverk verið ein varði í sjálvum sær.

Ein mentunarhetja Føroya

Emil Thomsen er einki minni enn ein tjóðskaparlig mentunarhetja. Hann hevur offrað sítt lív fyri føroyska mentan, og tað má sigast at hava eydnast væl. Favnar av tí besta, til er er komið av føroyskum bókaverkum.

Eg trúgvi aldri, at pengar hava drivið hann í hetta velduga verk. Heldur tjóðskaparlig idealisma.

### Emil og Tívil

Men verður talt saman, og tungt er at telja segði Tívil, so hevur Emil útgivið út við 400 umsetingar og um leið 300 bókaheiti. Samantalt telur hetta út við eina millión.

Eingin livir ævinliga. Men Emil má fáa ein minnisvarða. Helst ikki ov langt frá skyldmanni hansara Nólsoyar-Pálli.